Jóannes sætti løgmaður við steypinum

Ólavsøkudag verður sætta finalan um annað steypið, sum Landsstýrið hevur givið at kappast um

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen

Løgmaður hevur í hvussu so er tríggjar uppgávur á Ólavsøku. Eingin ivi er um, hvør álvarsamasta og týdningarmiklasta uppgávan hjá honum er. Sambært stýrisskipanarlógini skal løgmaður, tá ið tingið er sett ólavsøkudag, greiða frá, hvussu støðan er, og hvørjar ætlanirnar hjá politiska myndugleikanum eru.

Hinar báðu uppgávurnar hjá løgmanni hava við ítróttin at gera, og tað passar mikið væl, at løgmaður á tjóðarhátíðini hevur uppgávur av hesum slagnum. Hann er jú verji hjá Ítróttarsambandi Føroya.

Uppgávan ólavsøkuaftan er at handa Útvarpssteypið til tann kappróðrarbátin, sum hevur staðið seg best í róðrarárinum. Hin uppgávan er ólavsøkudag at handa løgmanssteypið.

Finalan um løgmanssteypið verður ólavsøkudag klokkan fýra. NSÍ og HB skulu spæla. Talan er um sættu finaluna um hetta løgmanssteypið. Higartil hevur B36 vunnið tvær ferðir, og KÍ, NSÍ og GÍ hava vunnið eina ferð í part. Hvussu HB og NSÍ hava fyrireika seg, og hvussu tey eru fyri undan finaluni, verður meiri gjørt við í blaðnum í morgin.

Frammanundan er greitt, at í hvussu so er ein leikari verður nýggjur í finaluni. Tað er løgmaður. Hetta verður fyrsta ferðin, at Jóannes Eidesgaard fer at handa løgmanssteypið. Tá ið Anfinn Kallsberg var løgmaður, høvdu vit fleiri ferðir á orði, at í dreinjaárunum spældi hann við KÍ, har hann í 1962 var við til at vinna FM í dreingjadeildini.

Jóannes Eidesgaard verður sætti løgmaðurin í røðini av teimum, sum skulu handa løgmanssteypið til føroysku steypavinnararnar

Jóannes Eidesgaard er rættuliga áhugaður í ítrótti. Hann spældi í síni tíð í TB, har hann fyrst í sjeyti árunum var á besta liðnum. Hetta var stutt frammanundan, at TB kom heilt upp á tindin og vann FM í 1976 og í 1977.

Tað hevur verið spælt um løgmanssteypið síðani í 1989. HB vann fyrsta steypið til ognar í 1998.

Jóannes Eidesgaard er sætti løgmaður, sum fer at handa løgmanssteypið. Hinir, sum hava átt henda heiðurin, eru Jógvan Sundstein, Atli P. Dam, Marita Petersen og Anfinn Kallsberg.

So skal leggjast afturat, at eina ferð hevur varaløgmaður handað løgmanssteypið. Tað var Finnbogi Ísakson, sum handaði steypið fyri løgmann, sum var burturstaddur. Hetta var frammanundan, at finalan um løgmanssteypið varð spæld á Ólavsøku.

Gert Langgaard og Hallur Danielsen, sum her eru avmyndaðir í steypafinaluni millum NSÍ og HB fyri tveimum árum síðani, verða óivað báðir at síggja á vøllinum í ár eisini
mynd: Álvur Haraldsen

Í fjør vóru tað B36 og GÍ, sum hittust í finaluni um Løgmanssteypið. Havnarfelagið vann tá steypið við einum 3-1 sigri.
mynd: Álvur Haraldsen

Steypavinnarar 1955-2003

1955: HB
1956: TB
1957: HB
1958: TB
1959: HB
1960: TB
1961: TB
1962: HB
1963: HB
1964: HB
1965: B36
1966: KÍ
1967: KÍ
1968: HB
1969: HB
1970: strikað
1971: HB
1972: HB
1973: HB
1974: VB
1975: HB
1976: HB
1977: TB
1978: HB
1979: HB
1980: HB
1981: HB
1982: HB
1983: GÍ
1984: HB
1985: GÍ
1986: NSÍ
1987: HB
1988: HB
1989: HB
1990: KÍ
1991: B36
1992: HB
1993: B71
1994: KÍ
1995: HB
1996: GÍ
1997: GÍ
1998: HB
1999: KÍ
2000: GÍ
2001: B36
2002: NSÍ
2003: B36

Løgmanssteypið 1989-2003

1989
B71-HB 0-0
B71-HB 0-2: Oddbjørn Joensen, Gunnar Mohr
1990
GÍ-KÍ 1-6: Per Dalheim - Beinur Poulsen, Kurt Mørkøre, Olgar Danielsen, Allan Mørkøre br, sjálvmál, Todi Jónsson
1991
B36-HB 1-0: Bergur Magnussen -
1992
HB-KÍ 1-0: Gunnar Mohr
1993
B71-HB 1-1: Páll á Reynatúgvu - Rúni Nolsøe
B71-HB 2-1: Torbjørn Jensen, Páll á Reynatúgvu - Hans Petur í Brekkunum
1994
B71-KÍ 1-2: Eli Hentze - Jákup Mikkelsen br, Arnhold Joensen
1995
B68-HB 1-3: Aksel Højgaard - Rúni Nolsøe, Andreas F. Hansen, Eyðun Samuelsen
1996
GÍ-HB 2-2: Henning Jarnskor, Símun Petur Justinussen - Hallur Danielsen, Petur Slyne
GÍ-HB 2-2
5-3 eftir longda leiktíð: Rúni Justinussen (2), John Petersen, Símun Petur Justinussen, Agnar Højgaard - Uni Arge (2), Hallur Danielsen
1997
GÍ-VB 6-0: Sámal Joensen, Henning Jarnskor (3/1br), Pauli Jarnskor, Øssur Hansen -
1998
HB-KÍ 2-0: Hans á Lag, Andrew av Fløtum -
1999
B36-KÍ 1-3: Jens Kristian Hansen - Rógvi Jacobsen, Kurt Mørkøre, Arnold Joensen
2000
GÍ-HB 1-0: Óli Hansen -
2001
B36-KÍ 1-0: Jens Kristian Hansen
2002
HB-NSÍ 1-2: Rógvi Jacobsen - Ulrik Balling, Brynjolvur Nielsen br
2003
B36-GÍ 3-1 eftir longda leiktíð: Jens Kristian Hansen, John Petersen, Jákup á Borg - Súni Olsen

Vænta ikki tað stóra

Hóast B36 skal spæla seinna UEFA-Cup dystin móti lettiska Metalurgs hóskvøldið, verður ikki farið úr Føroyum fyrr enn hósdagin

UEFA-CUP FYRIREIKINGAR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað er ikki nógv, sum bendir á, at B36 væntar sær tað stóra burtur úr seinna UEFA-Cup dystinum móti lettiska Metalurgs. Ikki fyrr enn slakar 12 tímar fyri dystarbyrjan verður farið úr Føroyum til Letlands.

Deildar meiningar

B36-hópurin savnast tó kvøldið fyri, ólavsøkuaftan, og tá verður farið vestur í Vágar, har gist verður undan fráferðini til Letlands. Hetta skal ikki verða fallið í góða jørð hjá summum av spælarunum hjá B36, men liðskiparin, John Petersen, sigur tó, at menn góðtaka støðuna. - Tað er serliga hjá familjumonnunum, at tað kemur illa við at fara vestur í Vágar ólavsøkuaftan, tí konur og unnustur kanska høvdu ætlað sær ein túr í býin, meðan menninir vóru heima hjá børnunum, sigur hann.

Spurdur um tað ikki er at geva skarvin yvir, tá ið farið verður til Letlands so stutt undan dystinum, svarar John Petersen, at tað eru tað deildar meiningar um. - Summi halda, at tað er at geva skarvin yvir, meðan onnur halda, at tað er gott, tí at man so sleppur undan matinum og hitanum har yviri, sigur B36-liðskiparin, sum sjálvur ikki hevur nakað ímóti at ferðast í tríggjar tímar stutt áðrenn dyst, tí tað er man eisini vanur við her heima, heldur hann.. John ásannar tó, at teir halda seg ikki hava serliga góðar møguleikar fyri at spæla seg víðari í Europeisku kappingini, og at dysturin tískil mest verður nýttur sum upptakt til seinnu hálvu av landskappingini.

Einaferð áður hevur eitt føroyskt lið ferðast á sama hátt sum B36 ger í ár, t.v.s. við at fara avstað á sjálvum leikdegnum, og tað var HB, sum fór til útidyst í Tromsø. Tað hepnaðist minni væl, tí eftir drúgvu ferðingina, noyddist HB at leggja rygg til ein lemjandi 0-10 ósigur, sum er størsti ósigurin hjá nøkrum føroyskum felag í altjóða fótbólti higartil. Spurningurin er so, hvussu tað fer at ganga hjá B36 ólavsøkudag í Letlandi.

Fyrri dysturin millum B36 og Metalurgs á Tórsvølli fyrr í mánaðinum endaði við einum 3-1 sigri til lettarnar, eftir at lettiska liðið var á odda 2-0 longu aftaná fimm minuttir.

Liðskiparin hjá B36, John Petersen, væntar ikki, at B36 hevur teir stóru møguleikarnar at spæla seg víðari í UEFA-Cup undan dystinum móti lettiska Metalurgs ólavsøkudag.
Mynd: Álvur Haraldsen

KÍ og Skála spæla ólavsøkuaftan

Nú tað ikki liggur fyri hjá B36 at spæla ólavsøkudyst, hevur felagið skipað fyri, at KÍ og Skála ístaðin hittast á ovara vølli ólavsøkuaftan

ÓLAVSØKUDYSTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Orsøkin til, at tað ikki ber til hjá árstalsfelagnum at spæla ólavsøkudyst, er tann, at B36 ólavsøkudag skal spæla Uefa Cup dyst á útivølli ímóti lettiska Metalurgs, sum fyri knappum tveimum vikum síðani vann 3-1 á B36 á Tórsvølli í fyrra dystinum sínámillum.

Tvey áhugaverd lið

Formaðurin í B36, Kristjan á Neystabø, sigur, at hóast tað ikki liggur fyri hjá B36 at spæla ólavsøkudyst, so skulu áskoðararnir ikki snýtast fyri ein góðan dyst ólavsøkuaftan, og tí hevur felagið heitt á Skála og KÍ um at koma til Havnar at spæla, og tað hava bæði feløgini játtað.

At valið er fallið á júst KÍ og Skála er ikki av tilvild, sigur formaðurin í B36. Hann sigur, at hesi bæði feløg hava eitt sermerkt ár júst í ár. KÍ fyllir 100 ár, og haraftur hevur tað verið siðvenja at sæð klaksvíkingar í Gundadali á ólavsøku, har teir hava dystast við HB. Í ár spælir HB so steypafinalu móti NSÍ ólavsøkudag, og tí var tað náttúrligt hjá B36, at KÍ skuldi verða annað liðið í dystinum ólavsøkuaftan. Skála hinvegin hevur ikki verið at sæð í Gundadali á ólavsøku áður, men nú teir eru við í oddastriðnum í 1. deild, eru teir sjálvsagt eisini áhugaverdir.

Við at hava fingið hesi bæði lið at dystast ólavsøkuaftan, hevur tað eydnast leiðsluni í B36 at fáa eitt lið at umboða Eysturoynna í dysti móti einum liði úr næststørsta býnum í landinum. Harvið eru tað tvey rættuliga stór økir í landinum, ið verða umboðaði í dystinum á ovara vølli í Gundadali ólavsøku aftan millum KÍ og Skála.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

Bilur + 2 fólk til Danmarkar úr 2.720,-

Føroyar – Danmark ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin

Lágarstíð	Couchettir	4-koyggjukamar, inn	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	2.720	3.200	-	-	-	4.320
Bilur + 3 fólk	3.580	4.300	-	5.110	5.530	-
Bilur + 4 fólk	4.440	5.400	6.080	-	-	-
Bilur + 5 fólk	5.300	6.500	-	-	-	-

Háarstíð	Couchettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	3.720	4.160	-	-	-	5.800
Bilur + 3 fólk	4.780	5.440	-	6.820	7.420	-
Bilur + 4 fólk	5.840	6.720	7.560	-	-	-
Bilur + 5 fólk	6.900	8.000	-	-	-	-

Bilur + 2 fólk til Noregs úr 1.960,-

Føroyar – Noreg ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin

Lágarstíð	Couchettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	1.960	2.280	-	-	-	2.920
Bilur + 3 fólk	2.640	3.120	-	3.600	3.840	-
Bilur + 4 fólk	3.320	3.960	4.440	-	-	-
Bilur + 5 fólk	4.000	4.800	-	-	-	-

Háarstíð	Couchettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	2.480	2.960	-	-	-	3.760
Bilur + 3 fólk	3.300	4.020	-	4.620	5.100	-
Bilur + 4 fólk	4.120	5.080	5.720	-	-	-
Bilur + 5 fólk	4.940	6.140	-	-	-	-

Bilur + 2 fólk til Hetland úr 1.420,-

Føroyar – Hetland ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin

Lágarstíð	Couchettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	1.420	1.710	-	-	-	2.240
Bilur + 3 fólk	1.860	2.295	-	2.715	2.970	-
Bilur + 4 fólk	2.300	2.880	3.280	-	-	3.940
Bilur + 5 fólk	2.740	3.465	-	-	-	-

Háarstíð	Couchettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	1.880	2.240	-	-	-	2.900
Bilur + 3 fólk	2.460	3.000	-	3.480	3.810	-
Bilur + 4 fólk	3.040	3.760	4.160	-	-	5.080
Bilur + 5 fólk	3.620	4.520	-	-	-	-

Bilur + 2 fólk til Íslands úr 2.330,-

Føroyar – Ísland ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjørður ella hinvegin

Lágarstíð	Couchettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	2.330	2.650	-	-	-	3.530
Bilur + 3 fólk	3.045	3.525	-	4.185	4.545	-
Bilur + 4 fólk	3.760	4.400	4.960	-	-	-
Bilur + 5 fólk	4.475	5.275	-	-	-	-

Háarstíð	Couchettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	3.080	3.440	-	-	-	4.640
Bilur + 3 fólk	4.020	4.560	-	5.460	5.940	-
Bilur + 4 fólk	4.960	5.680	6.480	-	-	-
Bilur + 5 fólk	5.900	6.800	-	-	-	-

Prísirnir í lágarstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háarstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE